# Reglugerð fyri handfaring og varðveitslu av uppgávum og próvtøkusvørum á Fróðskaparsetrinum.

1. Deildarleiðarin hevur ábyrgdina av, at alt próvtøkutilfarið og próvtøkusvør verða handfarin rætt, so tey ikki koma í skeivar hendur, og at próvbókarskjølini verða viðgjørd rætt og koma aftur rætt til próvbókina. Deildarleiðarin kann lata deildarskrivaranum ella øðrum fólki á deildini hesa ábyrgd.

2. Tá próvtøkan er liðug,, skulu uppgávusvørini goymast undir lási á tryggum stað á deildini. Neyðug ljóstøk verða tikin og goymd saman við upprunatilfarinum, til tey eru latin lærara og próvdómara. Eitt eintak av hvørjum – spurningi og svari – skal altíð liggja eftir á deildini.

3. Lærarin og próvdómarin fáa próvtøkusvør og onnur neyðug skjøl beinleiðis í hondina ella við posti. Skal próvdómarin hava upprunaskjøl, verða tey send við innskrivaðum posti og skulu sendast aftur til deildina á sama hátt.

4. Lærari og próvdómari hava skyldu til at goyma og handfara tilfarið trygt undir próvdømingini.

5. Próvtøkusvør og annað ljóstikið tilfar, sum verður latið lærara og próvdómara, verða makulerað, men lærari og próvdómari skulu hvør í sínum lagi goyma viðmerkingar sínar - sum ásett í Kunngerð um útbúgvingar á Fróðskaparsetrinum.

6. Eftir próvdøming verða spurningar, próvskjøl og onnur upprunaskjøl arkiverað á deildini. Einki upprunatilfar kann makulerast fyrr enn 2 ár eftir próvtøkuna.

7. Heimauppgávur, bachelor-, master- og høvuðsuppgávur verða varðveittar á deildini. Eitt avrit av øllum bachelor-, master- og høvuðsritgerðum verður latið Landsbókasavninum. Studenturin verður kunnaður um tað og samstundis biðin um at upplýsa, um ritgerðin kann lænast út ella ikki.

8. Studentaavrik, sum verða goymd til granskingarendamál, skulu, eftir at kærufreistir o.l eru farnar, goymast í próvtøkusettum merktar við: Próvtøku og skeið nr., lestrarhálvu og ár, og læsast inni.

9. Verða avrik hjá studentum tikin fram til at gera hagtøl, samanberingar o.t. við, skal innihaldið í granskingarhøpinum anonymiserast, soleiðis at tað ikki ber til kenna aftur avrikið hjá einstøkum studentum.

10. Verða sjónarmið og greiningarúrslit o.t. úr avrikum hjá studentinum endurgivin í greinum og bókum, skulu høvundur og uppruni verða nágreinilga tilskilað.

Samtykt á setursráðsfundi 27. mai 2008

Jóan Pauli Joensen, rektari